Shell hurðina upp á glopp til Arktis

Jan Müller

30.10.2015 - 12:42

Oljan.fo

Hóast oljufelagið Shell herfyri boðaði frá, at tað heilt fer at gevast við oljuleitingini í Arktis, so sigur felagið nú kortini frá, at tað fer at halda dyrnum á glopp. Felagið fer framvegis at varðveita síni loyvi út fyri Alaska, har tað boraði herfyri. Tann boringin gekk ikki sum ætlað. Undan tí hevði Shell brúkt umleið 35 mia. kr. til sítt samlaða virksemi í Arktis síðani 2005. Nú gevst Shell so við sínum virksemi har fyribils, men fer at varðveita møguleikan einaferð í framtíðini at seta borin í aftur undirgrundina. Tað var miseydnaða royndin at finna kolvetni umframt sera stóru útreiðslurnar og so eisini sera óvissu myndugleikakrøvini, sum hevði við sær, at Shell kappaði á stokkinum. Annars ganga nøkur av loyvunum frá myndugleikunum út millum 2017 og 2020. Felagið ætlar sær tó at tryggja sær, at tað ikki missir virðini hesi loyvini hava. Um Shell skal varðveita síni loyvi, so fer hetta at kosta felagnum 200 mill. kr. frá 2016 til 2020.

Van Beurden, stjóri í Shell sigur í sambandi við, at felagið hevur kunngjørt úrslitið fyri 3. ársfjórðing, at felagið ynskir at varðveita síni loyvi, hóast tað hevur sagt frá, at tað fer ikki at bora nýggjar brunnar í 2016. Hvat hendir eftir tað er framvegis óvist.Felagið noyðist at søkja um at fáa loyvini endurnýggjað hjá amerikonsku myndugleikunum, skal tað einaferð í framtíðini fara undir aftur boringar. Her setir felagið so vónir sínar til, at ein komandi amerikanskur forseti skal ganga inn fyri at endurnýggja loyvini. Bæði Statoil og ConocoPhillips hava havt leitiloyvi í amerikanska partinum av Arktis og hava søkt um endurnýggjan av sínum loyvum men hava fingið noktandi svar. Tey hava so appelerað hesi svarini.